UTTAN ÚR HEIMI



"Rita" kravdi bara eitt mannalív, men nógv hús eru oyðiløgd

Mynd: Reuters

# "Rita" ikki so ring kortini

**Ódnin "Rita" gjørdi munandi minni skaða enn væntað, men tað fer kortini at taka drúgva tíð at umvæla tað, sum fór**

VEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Teir amerikonsku suðurstatirnir sluppu munandi betur enn væntað, tá tropiska ódnin "Rita" kom í land. Tað komst av, at ódnin viknaði, meðan hon nærkaðist landi, og harafturat tók hon eina aðra leið, enn veðurmenninir upprunaliga hildu. Tað gjørdi, býirnir Houston og Galveston sluppu undan tí ringasta.

Harafturímóti var skaðin so mikið størri á marknaleiðini ímillum Texas og Louisiana. Serliga býirnir Lake Charles í Louisiana og Port Arthur og Beaumount í Texas fingu harða viðferð. Har eru nógv hús oyðiløgd.

Kortini gjørdi ódnin stóran skaða sum heild. Í gjár lógu næstan ein millión fólk í streymloysi, og summastaðni fer tað at taka fleiri vikur at umvæla elskipanina. Í teimum støðunum noyðast fólk helst at bíða leingi eftir at sleppa heimaftur. Nógvastaðni standa vegirnir undir í vatni, og summastaðni eru vegirnir so illa farnir, at teir eru ónýtiligir. Tí er tað ein spurningur,

Tær tropisku ódnirnar hava nógv regn við sær, og stór øki standa undir í vatni. Samstundis hava veðurmenninir boðað frá uppaftur meiri regni teir næstu dagarnar. Tað kemst av, at tvey hátrýst eru norðari, og at tey helst fara at hava við sær, at "Rita" verður liggjandi uppi yvir Texas og Louisiana. Tí er tað ikki óhugsandi, at tað fer at regna illa fleiri dagar afturat, siga veðurmenninir.

"Rita" kravdi eitt mannalív, og myndugleikarnir eru sannførdir um, at tað vóru boðini um at rýma úr økinum, sum gjørdu, at fleiri ikki lótu lív. Hildið verður, at umleið 2,7 milliónir fólk fóru heiman, tá boðini um at rýma undan ódnini komu.

# Sharon í andróðri

**Afturtøkan úr Gaza kann kosta ísraelska forsætisráðharranum politiska lívið. Men hann gevst neyvan so**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ariel Sharon fekk ein frammaná, tá fyrrverandi forsætisráðharrin Benyamin Netanyahu fór á røðarapallin á landsfundinum hjá Likudflokkinum sunnudagin.

- Tað gekk, júst sum eg segði. Gaza er vorðið ein islamsk yvirgangsstøð, segði Netanyahu. Tá Sharon fór upp á røðarapallin at svara atfinningunum, virkaði mikrofonin ikki, og hann rýmdi av fundinum í øðini.

Netanyahu kunngjørdi herfyri, at hann ætlar sær at verða forsætisráðharraevni hjá Likud á valinum næsta ár. Við øðrum orðum bjóðar hann Sharon av. Netanyahu var fíggjarmálaráðharri í verandi stjórn, men hann legði frá sær í síðsta



*Ariel Sharon*

mánað fyri at mótmæla afturtøkuni úr Gaza. Nú hevur hann so sett sær fyri at fáa Sharon skúgvaðan til viks og tess fyrr, tess betur.

Likudflokkurin skuldi atkvøða um leiðarastarvið í gjárkvøldið, og teir flestu eygleiðararnir væntaðu, at Sharon tór at tapa. Spurningurin er so, hvat hann ger. Jerusalem Post skrivaði í gjár, at tað er als ikki óhugsandi, at Sharon fer at stovna ein nýggjan flokk, verður hann vrakaður í Likud. Eygleiðarar halda, at ein flokkur hjá Sharon fer at liggja í miðjuni í ísraelskum politikki, og at hann kann fáa stóra undirtøku á valinum í apríl. Hinvegin fer tað, sum eftir verður av Likudflokkinum, bara at fáa nøkur fá umboð á ting, halda eygleiðararnir.

## Royna sjálvmorð

Ein kanning hjá Fólkatingsins umboðsmanni staðfestir, at alt fleiri og fleiri fangar í donskum fongslum royna at taka lívið av sær.

Hans Gammelgtoft-Hansen, umboðsmaður, skrivar í frágreiðingini, at í fjør fekk hann boð um 67 sjálvmorðsroyndir í fongslunum. Í 2003 var talið 37, og árið fyri var tað 40. Higartil í ár hevur umboðsmaðurin fingið boð um 44 sjálvmorðsroyndir.

Kim Østerbye, sum er formaður í felagnum hjá fongsulsstarvsfólkunum, heldur, at viðurskiftini í fongslunum eru ein orsøk til, at latat fleiri fangar royna at beina fyri sær. Hann vísir á, at tað er vorðið sera trongligt í fongslunum, og tá starvsfólkatalið ikki veksur tilsvarandi, hava starvsfólkini ov lítla tíð til tann einstaka fangan, sigur Kim Østerbye við danska útvarpið.

## Stóran skaða av bumbu

Libanska tíðindakvinnan May Shidyak fekk stóran skaða, tá ein bumba brast í bili hennara seinnapartin sunnudagin.

Libanska løgreglan sigur, at bumban lá undir bilførarasetrinum, og seinni kunngjørdi sjónvarpsstøðin LBC, at May Shidyak hevði fingið so stóran skaða, at læknarnir høvdu verið noyddir at taka annað beinið og aðra hondina.

Bilurin hjá teirri kendu tíðindakvinnuni fór í smildur, og eldur kom í hann, men tað eydnaðist øðrum at fáa ta særdu kvinnuna út. Í gjár hevði eingin átikið sær ábyrgdina av atsóknini.

Hetta er tann tólvta bumbuatsóknin í Libanon, síðani fyrrverandi forsætisráðharrin Rafiq Hariri og 20 onnur doyðu í einari bumbuatsókn í Beirut í februar. Ta ferðina fekk sýriska fregnartænastan skyldina.

## Krokodilla drap ferðamann

Alt bendir á, at tað var ein krokodilla, sum drap ein bretskan ferðamann, sum var farin at svimja í einari á á avstralsku oynni Groote Eylandt.

Líkið av tí 37 ára gamla Russel Harris varð funnið um vikuskiftið, og fleiri tekin eru, sum benda á, at ein krokodilla hevur lopið á hann og dripið hann. Avstralska løgreglan sigur, at ferðafólk veiða ofta í ánni, og at summi fara útí, sjálvt um tað ikki er óvanligt at síggja fýra metrar langar krokodillur har. Aftan á tilburðin um vikuskiftið hava myndugleikarnir gjørt av at ávara fólk betur ímóti at fara út í ánna.

Myndugleikarnir siga, at tað var ein saltvatnskrokodilla, sum beindi fyri bretska ferðamanninum. Hesar krokodillurnar, sum kunnu verða upp í sjey metrar langar, koma ofta niðan í áirnar. Tær eru eisini vorðnar væl fleiri í tali, síðani myndugleikarnir eina ferð í sjeytiárunum settu fólki forboð fyri at veiða tær.

Fyri einum góðum mánað síðani drap ein krokodilla ein 60 ára gamlan mann, sum var farin at veiða í útnyrðingspartinum av Avstralia. Maðurin sat í einum lítlum báti, men krokodillan toygdi seg upp eftir honum og tók hann.

## Gav hávinum ein frammaná

Ein 44 gamal avstraliumaður slapp óskaddur frá tilburðinum, tá hann kom í hóslag við ein háv seinasta fríggjadag.

Brad Satchell sigur við CNN, at í fyrstani helt hann tað vera ein kóp, sum kom ímóti sær, men so varnaðist hann, at tað var ein hávur. Hann gjørdi tí ikki mætari enn at leypa á hávin. Við aldubrettisum sum skjøldri sló hann hávin fleiri ferðir í høvdið, og tað endaði við, at hávurin rýmdi.

Aftaná greiddi Brad Satchell frá, at hann hevði lisið eina grein í einum blaði um ein líknandi tilburð fyri stuttum. Ta ferðina leyp ein hávur á tann 40 ára gamla Jake Heron, men tað eydnaðist honum at sleppa undan hávinum við at sláa og sparka hann. Jake Heron slapp tó ikki meinaleysur frá bardaganum við hávin. Hávurin beit hann í annan armin og annað beinið, men tó ikki so meint, at Jake Heron fekk varandi mein av tí.